# BØNARLØTAN

Oktober 2017 32. árg.

## *1. Sunnudagur* *Opinb. 17.1-18*



*Brynleif við liði á ungdómslegu í 1967.*

**50-ára hátíðarhald í Zarepta 14. okt.**

| | |
|---|---|
| Kl. 13 | Tiltakið byrjar. |
| Kl. 13-18 | Filmsbrot á skíggja hvønn ½ tíma. |
| Kl. 13-18 | Drekkamunnur í matarhøllini. |
| Kl. 14 | Løta í salinum við sangi og røðum. |
| Kl. 16 | Løta í salinum við sangi og røðum (endurtøka). |
| Kl. 18 | Tiltakið endar. |



*Zarepta í dag.*

## ZAREPTA

Arbeiðið upp á nýggja svimjihylin byrjar 17. okt.; arbeitt verður týsdag, fríggjadag og leygardag. Kunning: Napoleon Vang, tel. 214992, Símin Pætur á Torkilsheyggi, tel. 747111, Birgir Andreasen, tel. 554680.

## PAPUA NÝGUINEA, Sorimi
## Carol og Poul Joensen
## Jonathan Daniel 17, Ísak 14

Frá 1. okt til 8. nov. vitji eg samkomuna á Papua Ný Guinea og haldi á við bíbliuumsetingini. Vit skriva nýtt tilfar og gjøgnumganga Lukasar ev. og brot úr Ápostlasøguni saman við umsetingarráðgeva.

## KRINGVARPIÐ

1. okt. Útvarpsmøti, Zarepta

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg fór úr Føroyum 5. sept., men kom longu heimaftur 20. sept., tí mamma bleiv ússalig. Ungi maðurin úr Tongia, sum var á skeiði í bíbliuumseting, helt áfram, eftir at eg var farin heim. Biðið, at Harrin gevur honum vísdóm og dirvi at umseta úr Gamla Testamenti. Trúgvandi í Tongia møtast hvørt mánakvøld, tá Erik lærir tey úr Orðinum.



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Í okt. ferðast vit at luttaka á møtum, men meginpartin av tíðini fyrireika vit túrin til Asia frá 20. nov. til hálvan febr. Neyðugt er, at vit fyrireika so nógv sum møguligt frammanundan.

***Bønarløtan:*** *Góða Judy! Hjartaliga tillukku við 70-ára føðingardegnum 30. sept.!*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

Nýggju næmingarnir fara til Rumenia síðst í okt. at kunna seg um trúboðaravirksemi uttanlands. Tað er krevjandi hjá lærarunum at undirvísa einum árgangi afturat. Simon skal á stevnu í Grikkalandi fyri bíbliuskúlaleiðarar fyrst í okt.

★ Í dag fyllir Karina Tutty 16 ár.

## *3. Týsdagur* *Opinb. 18.1-24*



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 10, Andreas 8, Kristina 6**

Nógv fólk kemur til møtini í Kristnastovu, og tíðugt er heldur trongligt. Kafé-møti verður á Oyrasundskollegiinum í okt. Árliga legan verður á Nordsjællands Efterskole 19. - 22. okt. Sámal Mikkelsen úr Klaksvík hevur bíbliutímarnar.

⋆ Í dag fyllir Nana Mortensen 6 ár.

**Føroysk møtir í Jútlandi**

14. okt. kl. 19 byrja føroysku møtini aftur
í Ådalsparken 33, 6710 Esbjerg.

## *4. Mikudagur* *2. Mós. 26.15-37*



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 10, Svend 9, Terji 5, Petra 3**

21. okt. verður farið til USA á tónleikaverkætlan við Eyðuni Jacobsen. Dyr eru gloppaðar til tænastu í Íslandi og Nuuk. Í Føroyum ætla vit at hava evangeliskar røðir í vetur.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 10**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**

**DANMARK**
**– Glostrup Frikirke**

## *5. Hósdagur* *Sálmur 105*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygarkvøldið 7. okt. kl. 19 í Bethania-kirkjuni, Dag Hammarskjöldsgade 2A í Aalborg.

## *6. Fríggjadagur* *Opinb. 19.1-21*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 12, Aron 5, Noah Kristian 3**
Vit í The Well-tænastuni eru flutt í nýggj høli og hava aftur møguleika at bjóða trúboðarum, ið standa við eitt vegamót í tænastuni, at koma til okkara at fáa hjálp. Sum familja noyðast vit úr Teilandi síðst í okt. fyri at søkja um uppihaldsloyvi av nýggjum.

## *7. Leygardagur* *2. Mós. 27.1-21*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Vit eru í USA í okt. Ætlanin er at koma heim ein lítlan steðg í nov. á veg aftur til Italia.

**OM, ONGLAND, Birmingham**
**Claire og Craig Niclasen, Elizabeth 11, Rebekah 9, Lydia 7**
Ráðstevnan fyri kurdisk trúgvandi úr trimum ymiskum býum gekk væl. Helst er hetta fyrstu ferð, at kurdisk trúgvandi í Stóra Bretlandi savnast til undirvísing og samfelag. Biðið, at tey halda á at vaksa í trúnni.

⋆ Í dag fyllir Jónatan Tuohy 8 ár.

## *8. Sunnudagur* *Opinb. 20.1-15*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 9**
Trúarverjuskúlin fyri ung byrjar í okt. ella nov. Endamálið er at geva teimum ungu amboð til próvførslu og um iva, evangelisering og eftirarbeiði. Biðið fyri Adoniu, at tað eydnast at finna betri viðgerðir. Veturin er altíð ein avbjóðing fyri hana heilsuliga. Joy er byrjað á miðnámi.

## *9. Mánadagur* *2. Mós. 28.1-21*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**
Tað kennist truplari enn áður at finna fram til, hvar føroyskir sjúklingar eru innlagdir. Tí er øll hjálp og upplýsing kærkomin. berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Eva 17, Miriam Joy 14, Noah 11, Lydia Sigrid 0**

## *10. Týsdagur* *Opinb. 21.1-8*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 14**
Í okt. heldur Ingvard á at læra um lív Jesusar. Hinir lærararnir á fyrsta ári undirvísa um hesi evni: tær fimm Mósebøkurnar, læran um Gud, tulkingarlæra og søga í Gamla Testamenti. Næmingarnir trívast, hóast teir skulu venja seg við nýtt umhvørvi og nýggja tímatalvu.

## *11. Mikudagur* *2. Mós. 28.22-43*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**

Aftur í heyst og vetur er ætlanin at undirvísa børnunum í samkomuni og teimum, sum hava verið á legunum í summar. Ulla Tindalíð, Elin Sørensen og Ragnhild í Skorini Jacobsen halda á í hesum arbeiði við góðari hjálp frá øðrum í samkomuni. Gleðiligt, at nøkur ung eru komin afturat, og at nøkur komu til trúgv á ungdómsleguni í summar. Tí ynskja vit at byrja ungdómsarbeiði í Epanezer.

**– Filip og Ane Sivertsen, Cecilie 14, Kristian 12**
**– Óli og Anne-Sophie Tindalíð, Liljan 12, Leanna 11**

## *12. Hósdagur* *Sálmur 106.1-23*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

20. aug. gjørdist eitt ynski, vit leingi hava havt, veruleiki. Vit høvdu okkara fyrsta evangeliska møti heima hjá okkum sjálvum, væl hjálpt av manningini á Juvel 2. Saman við henni var stovan full – grannar, vinir og tannáringar, ið vóru á legu sum børn. Í sept. gróv eitt gott arbeiðslið út fyri nýggju sovilonini, stoypti fundament og gjørdi koyriveg frá húsunum oman á bryggjuna. Páll hevur ligið 16 dagar á sjúkrahúsi við herviligari pínu orsakað av nerv í rygginum, sum liggur í klemmu. Hann fær framvegis viðgerð, men hevur tað nógv betri.

**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *13. Fríggjadagur* *Opinb. 21.9-27*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

At kalla hvønn dag eru fólk á gátt hjá okkum. Vit tosa við tey um Harran og biðja fyri teimum. Vit fara til USA um hálvan okt. Hetta er seinasta ferð, at Solveig noyðist at vera í USA eitt longri tíðarskeið fyri at fáa dupultan ríkisborgararætt komandi vár. Vit flyta so til Qasigiannguit at búgva í juli. Ætlanin er tá at sigla bátin Qaamaneq úr Kanada til Grønlands. Biðið, at neyðugi peningurin at dagføra bátin verður tøkur.

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 15, Megan 12, Trisha 5, Emma 1**

Vit eru takksom fyri liðið úr Lívdini, sum hjálpti okkum í sept. at seta nýggju samkomuhølini í stand. Biðið, at arbeiðið út frá salinum verður nógvum menniskjum til signing.

## *14. Leygardagur* *2. Mós. 29.1-21*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Anna fekk góða umsorgan, meðan Dubby var í Senegal. Hon fer undir nýggja viðgerð í nov. Í Senegal var Dubby fegin um, at mótstøðan móti Orði Guds er minkað, og at fýra menn hava sett sær fyri at luta Orðið við saafi fólkið á saafi máli bæði í útvarpi og persónliga. Teir senda eisini á netinum. Vit hava silvurbrúdleyp 24. okt.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *15. Sunnudagur* *Opinb. 22.1-21*

**ÍSLAND, Ástjørn**

Biðið fyri børnunum og teimum ungu, sum vóru á legu við Ástjørn í summar, at tað, tey lærdu og upplivdu, verður til signing fyri tey og teirra heim.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**

**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**



Poul Jóhan hevur ábyrgdina av kristiligu tíðindasendingini í R7 annanhvønn mikudag kl. 15. Eina ferð um mánaðin talar Poul Jóhan eisini á kristiligu sjónvarpsstøðini Iktus.

## *16. Mánadagur* *1. Sámuel 15.20-35*



**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

Biðið fyri missiónsráðstevnuni Oltre í Italia 2. - 5. nov. www.oltrereachbeyond.com

**FØROYAR**

- **Birgit og Svenning av Lofti**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Annika og Poul Færø**
- **Maria og Jens Bech**
- **Lis Zachariassen**

## *17. Týsdagur* *Ápost. 17.1-20*



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 16**

Tað er trupult at fáa uppihaldsloyvi til Timothy, tí eru hann og Ivor ikki komnir aftur til Moskva. Biðið um varandi loysn, nú Timothy tekur sítt síðsta ár á skúlanum her. Minnist eisini Sonju í Dublin.

**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *18. Mikudagur* *1. Sámuel 16.1-23*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Mong eru heimleys av jarðskjálvtanum og nógva regninum. Biðið, at hjálpin kemur fram til teirra. Umsetingararbeiðið heldur á.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 6, Leah Eve 3**



**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 4, Micah 4**

Spennandi, tí nógv nýggj koma nú í samkomuna. Vit hava bert tveir sunnudagsskúlalærarar í løtuni, men okkum tørvar seks. Vit hava søkt um at leiga nýggjan bygning til samkomuna og bíða eftir svari.

## *19. Hósdagur* *Sálmur 106.24-48*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 13, Victoria, 11, Emma Grace 9, Jónatan 7, Markus 5, Evita Linda 2, Joy Hanna 0**

Vit eru takksom, at vit endiliga kunnu byrja at byggja á stykkið, sum samkoman hevur keypt. Hvønn mikudag fara vit á eitt viðgerðarheim fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar at læra tey sálmar og úr Bíbliuna. 22 børn koma til Escuelita Biblica.

## *20. Fríggjadagur* *Ápost. 17.21-34*

**USA, Nebraska, NTM**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 15**

David er sjúkur og hevur lítla orku. Biðið eisini fyri Karl, nú vit hava fingið at vita, at hann hevur autismu. Vit royna at finna honum hjálp.

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 0**

Vit fingu sonin Louis 24. aug. Hann hevur týskan ríkisborgararætt, men vit royna eisini at útvega honum amerikanskan ríkisborgararætt. Vit ætla at fara til PNG í nov. Okkara starvsfelagi har fer nú at undirvísa um lív, deyða og uppreisn Kristusar.



**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 5**

## 21. Leygardagur — 1. Sámuel 17.1-30

### PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele
### Annika og Simon Flanagan
### Nya 9, Noah 8, Karis 4, Judah 2, Ethan 0

23. aug. átti Annika sonin Ethan. Tey hava tað gott. Vit hava ábyrgd av átta næmingum á North Cotes. Biðið, at teir ikki bert fáa vitan, men uppliva friðin av at kenna Hin Einasta Sanna. Simon undirvísir í trúarlæru. Annika ansar børnunum og er um næmingarnar. Ætlan okkara er at fara aftur til Mengen á sumri 2018.

## 22. Sunnudagur — Ápost. 18.1-28

### DANMARK, Brejning
### Jan og Anne Zachariassen

Upptøkuhølið og skrivstovan eru flutt heim til okkara í vón um at finna bíligari høli at leiga. Vit hava átikið okkum at virka fyri stuðli til skúlagongd hjá deyvum børnum í ymiskum londum. Hvørjum barni tørvar 145 kr. um mánaðin, um tey skulu fáa skúlagongd á kristnari grund. Sí www.deafmin.org.

⋆ Í dag fyllir Sarah Mortensen 7 ár.

## 23. Mánadagur — 1. Sámuel 17.31-58

### TURKALAND, Istanbul
### Annika og Stephen Everett

Mong biðja um bíbliubrævaskeið, ringja ella tjatta. Nøkur fáa lesnað og senda spurnarbløðini innaftur. Í okt. talar Stephen á árligu ráðstevnuni hjá samkomu okkara í Oxford um evnið „Evangelisering – læra og praksis“. Seinni fara vit ein túr til Eysturturkalands.

## *24. Týsdagur* *Ápost. 19.1-22*

***Bønarløtan:*** *Góðu Anna og Dubby! Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum í dag!*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 13, Micah 10, Ezra 9, Uhenya 6, Boas 4**

Vit fyrireika nýggja legu. Vit gleða okkum eisini at koma heim síðst í nov. til 1. febr. Biðið, at tíðin heima verður til signing fyri okkum og onnur.

## *25. Mikudagur* *1. Sámuel 18.1-30*

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 13, James 11, Micha David 7**

Biðið um vísdóm, nú arbeiðsuppgávur og ábyrgd í Good Seed skulu endurskoðast. Allan hevur arbeitt við tónleikaverkætlan at geva øðrum samkomum at nýta. Tørvur er á persóni at skipa fyri næsta stigi, so verkætlanin kann fullførast.

## *26. Hósdagur* *Sálmur 107*

**TEILAND**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 16, Jonathan 15, Leslie 15, Emily 7, Bethany 2**

Í næstum vóna vit at fáa uppihaldsloyvi í eitt ár. Biðið, at málhjálpari okkara opnar hjartað, og at hon, maður hennara og dóttirin læra at trúgva á Jesus sum frelsara.

## *27. Fríggjadagur* *Ápost. 19.23-41*

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Jens Allan 16, Ryan 8**

Vit eru nú aftur í Guinea. Vit eru takksom, at tað hevur gingið væl at skriva frálærutilfar og at læra fólk at lesa og skriva susu málið. Ætlanin er nú at finna nakrar fáar næmingar at royna tilfarið.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen, Kano 8, Nana 6, Louie 3**

Hallur roynir at finna rætta málskeiðið, tí hann vil fegin læra torføra japanska málið. Shino roynir at koma at kenna fleiri kvinnur í grannalagnum.

## *28. Leygardagur* *1. Sámuel 19.1-24*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp, Ragnhild 13, Rebekka 12, Hanna 9**

Vit prenta nú 8 smáar lesibøkur, so vit kunnu læra fólk at lesa og skriva. Tað mennir tey og ger tey før fyri at lesa Skriftirnar sjálv. Til hvørja bók gera vit eisini smá kort við stavum og stavilsum, sum vit laminera.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## 29. Sunnudagur — Ápost. 20.1-16



### USA, North Carolina
### Charlotte, Calvary Church
### Gudny og John Munro

Harrin signar arbeiðið bæði millum børn, ungdóm og vaksin. Biðið, at John framhaldandi kann hava góða heilsu at virka og leiða fjølbroyttu tænastuna.

## 30. Mánadagur — 1. Sámuel 20.1-23

### OM FØROYAR
### Anita og Oddmar Tausen

Nýggja OM verkætlanin Riverboat byrjar síðst í des. Við leigaðum báti fara 80 fólk at sigla á evropeisku áunum at vitja sjey havnir í trimum ymiskum londum við tí visjón at bera fólki evangeliið. Fleiri føroyingar hava áhuga at fara við, og onkur er longu tilmeldaður. Logos Hope er í ódnarrakta Karibiska Havinum.

### FILIPSOYGGJAR, NTM
### Liz og Ragnar Niclasen

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**

### HJERTEFRYD – tanker, der glæder dit hjerte

**180 kr**

Sally Lloyd-Jones er kend fyri sínar barnabøkur. Í hesi andaktsbókini eru 101 stuttir tekstir fyri børn og vaksin um evangeliið, at Gud ókeypis gevur okkum av tí kærleika, sum Jesus keypti okkum. Bókin hóskar væl at lesa fyri børnum um songartíð ella við morgunmatarborðið.




Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo